# Fyrrverandi ríkmaður aftur fyri rættin

Maðurin, ið fyrr var ríkasti maður í Russlandi, Mikhail Khodorkovsky er aftur nú drigin fyri rættin í samband við skattasvik og hvítvask av peningi. Fyrrverandi eigarin av oljufelagnum Yukos, er lagdur undir at hava snýtt fyri 24 milliardir dollarar, og verður hann dømdur, so kann hann fáa upp til 15 ár afturat. Hann situr longu í fongsli fyri svik. Hetta var í 2005, tá hann varð dømdur at sita í átta ár. Miðlar ivast, um talan er um eina veruliga rættargongd, ella um tað bara er ætlanin at døma hann.





*Aliráðstevnan hevur stóran áhuga millum alarar og fólk við tilknýti til alivinnuna. Hópur av fólki lýddu á áhugaverdu framløgurnar á Hotel Føroyum fríggjadagin, tá eitt nú Durita Nielsen, granskari, legði fram úrslit av eini kanning um góðskuna í føroyskum laksi Mynd: Jens Kr. Vang*

heldur enn í størri mun at vísa á okkara dygdir og góðu vøru. Vit duga kanska ikki líka væl at "reypa", sum eitt nú norðmenn duga, leggur hon aftrat.

Nú hava vit so prógvini um, at føroyskur laksur er sera góður, vit hava ikki meira gaping enn aðrir, og bleiki táknuliturin sigur einki um feskleikan í fiskinum.

- Alt kann gerast betri, men vit í Føroyum hava sera góðar umstøður til at framleiða, virka og selja bestu vøruna til okkara keyparar. Fundamentið er í lagi. Vit hava góð kryvjivirkir, og vit hava dugnalig fólk, sum standa aftanfyri – og eru í framleiðsluni – á hesum virkjum.

Durita sigur, at enn er ikki greitt, um kanningarnar hjá henni verða tiknar uppaftur til heystar, soleiðis at tær kunnu gerast tvær ymiskar tíðir av árinum.

- Vit síggja sjáldan góðskutrupulleikar um veturin. Tað er mest um summarið og fyrst á heystinum, tá laksurin veksur skjótt, at størri vandi kann vera við góðskuni, leggur granskarin aftrat.

Durita Nielsen heldur, at útlitini í føroysku alivinnuni er góð, og hon heldur avgjørt, at okkara alivinna gongur eini spennandi tíð á møti.





*Myndirnar vísa, hvussu laksafløk við nógvari "gaping" og minni "gaping" síggja út. – Gaping er ikki nakað serføroyskt fyribrigdi, sigur granskarin, Durita Nielsen*